# Hotel Legoland ger ein góðan figur




Anna Maria Kvist, tíðindaleiðari hjá Legolandi greiðir frá: Vit hava leingi spælt okkum við tankan, um at gera tað til eina heilt serliga uppliving at búgva á Hotel Legolandi. Tað skal kennast sum um ein býr í sjálvum Legolandi. Heilt til børnini fara í song, skulu tey hava kensluna av, at tey búgva í sjálvum Legolandi. Tí hava vit gjørt 29 spildurnýggj kømur í vetur, sum hava eitt ævintýrskent snið, greiðir Anna Maria Kvist frá. Stóru kømurini hava eina barnaseksjón við nøkrum koyggjusengrum. Í tí eina kamarinum er ein vælgjørd legoslanga, sum er gjørd við gulum og svørtum legoklossum. Og í hvørjum kamari er eitt legodjór av onkrum slagi.

## Eitt slag av list

Spurd um ein kann loyva sær at siga, at mongu legofigurarnir kring alt Hotel Legoland eru eitt slag av list, svarar Anna Maria Kvist: - Ja her í Legolandi hava vit 12 modeldesignarir, sum brúka alla sína orku til at byggja við legoklossum, og hesi fólkini eru sanniliga listafólk á sínum øki. Eg havi enn ikki hoyrt um, at tey hava fingið eina uppgávu, sum tey ikki klára at loysa. Og eg eri eisini so hugtikin av, at tey eisini megna at gera lutir, sum eru heilt rundir, við legoklossum. Men tey megna at framleiða nakrar ógvuliga náttúrutrúgvar lutir.

## Ymisk tema

Á Hotel Legoland hava tey valt at hava ymisk tema, sum eru fyri bæði kynini. – Fyri genturnar hava vit gjørt nøkur ordan prinsessukømur, og tá er talan um eitt ljósareytt paradís fyri smágenturnar. Har er himmalsong, prinsessukrónur, og alt tað sum hoyrir til dreymin hjá tí lítlu gentuni. Vit hava eisini gjørt nøkur ordilig dreingjakømur, sum t.d. sjónarænarakømur, har ein kennir, at ein býr umborð á einum sjórænaraskipi. Og har eru nógvir av teimum lutunum, sum eru umborð á einum sjórænaraskipi, so børnini kunnu spæla líka til tey fara í song, greiðir Anna Marie Kvist frá.

## Børnini í fokus

Tað verður ikki bara arbeitt við tí sjónliga, ljóð hevur sín stóra leiklut á Hotel Legolandi. – Tá barnafamiljan t.d. kemur inn til okkara nýggju og stóru móttøku, so kann ein síggja ein risastóran legodreka, sum júst er klatraður upp gjøgnum ein brunn. Annan hvønn minutt gevur drekin ljóð frá sær, og av og á kemur eisini roykur frá drekanum, og hetta er nakað sum børnunum veruliga dámar, staðfestir Anna Maria Kvist. Spurd um hvussu tey vaksnu trívast á Hotel Legolandi, svarar Anna Maria Kvist: - Vit hava sjálvandi verið ógvuliga spent uppá hvussu tey vaksnu fóru at trívast her, aftaná tær stóru broytingarnar vit hava gjørt í vetur, men higartil hava vit bara fingið jaligar afturmeldingar frá bæði børnunum, og teimum vaksnu. Tá børnini trívast, so trívast foreldrini eisini. Børnini eru sjálvsagt í fokus her, men tað skal eisini vera okkurt fyri foreldrini. Har sum matstovurnar eru, har hava vit nøkur spælioki, har børnini kunnu spæla, meðan foreldrini so kunnu fáa tíð til at njóta ein góðan bita.

## Skattaveiða

Skipað verður eisini fyri einari skattaveiðu, tá børnini koma til Hotel Legoland. – Tá børnini koma inn í kamarið, so skulu børnini beinaveg í holt við at nærgranska serligu kømurini. Vit leggja eitt skattakort á pútirnar hjá børnunum, og hartil nakrar litblýantar, og so er meiningin, at børnini skulu fara á skattaveiðu inni í kamarinum. Børnini skulu loysa nakrar uppgávur, og megna tey at loysa uppgávurnar, so fáa tey nakrar kotur, sum tey skulu brúka, til at lata upp skattakistuna, sum er inni í kamarinum. Niðri í skattakistuni liggur sjálvsagt ein skattur, sum børnini eiga, tá tey hava funnið hann. Og eg fari ikki at avdúka hvat skatturin er, tað mugu børnini sjálv finna út av, tá tey koma til Hotel Legoland.





